**Frágreiðing um virksemi í 2012 í nevndini, sum umsitur norðurlendska týðarastuðulin.**

Viðvíkjandi tí at býta út stuðulin hevur virksemið verið sum vanligt, og stuðulin fyri 2012 er allur brúktur, og gott og væl tað.

Umsóknir og játtanir í árinum sóu soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Brahmadellarnir til danskt | kr.56.000 |
| Norðlýsi til danskt | kr.42.000 |
| Gullgentan til danskt | kr.20.000 |
| Veiða vind til íslendskt | kr.15.000 |
| Brahmadellarnir til norskt | kr.80.000 |
| Hvørjum flenna likkurnar at, Hugo til norskt | kr.50.000 |
| Sár á sál til danska framførslu | kr. 5.000 |
| Tilsamans | kr. 268.000, sum er eitt lítið yvirtrekk. |

Vit hava yvirskot og rentuvinning standandi frammanundan, so hetta er í lagi.

Til umsitingarligar útreiðslur eru árliga kr. 25.000. Av teimum hava vit brúkt soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Løn fyri arbeiðstímar | | kr.6.000 |
| Fundarpengar | | kr.6.000 |
| Lýsingar | Vencil | kr.1.875 |
| | Sosialurin | kr.2.387 |
| | Dimma | kr.2.256 |
| Fundurin í Oslo | | kr.13.507 |
| Tilsamans | | kr.32.025 |

Tær írestandi 7.225 kr. verða tiknar frá 2011, tá vit ongar ferðaútreiðslur høvdu. Fyri 2013 verða heldur ongar ferðaútreiðslur, tí ferðin til Finska Samaland í 2013 fekk aðra norðurlendska fígging.

Av eini eykajáttan, sum var latin í 2011 til luttøku á salon du Livre og Marchaise du la Poesie í Fraklandi, varð avlopið uml. 18.000 kr. nýtt til luttøku á bókamessuni í Gøteborg í 2012.

Saldoin á kontuni er í løtuni 198.000 kr., men tær flestu av teimum eru játtaðar umsøkjarum til bøkur, sum eru á veg.

Árligi fundurin varð í ár hildin í Finska Norðursámalandi. Við vóru umboð úr øllum Norðurlondum uttan Íslandi, sum ikki fekk sent umboð í ár.
Greitt var frá farna ári í ymisku londunum, og strategiin frameftir var viðgjørd. Umsitingin skuldi ætlandi flytast til Íslands, men hetta er broytt, og tey næstu árini verður umsitingin í Danmark.
Samtykt varð at næsti fundur verður í Føroyum, so í januar næsta ár koma hesi umleið 25-30 fólkini til Føroya at fundast.